**Nr. 32/2014**

**Bjarni Djurholm**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a.**

**Fyrispurningur viðv. støðuni hjá støkum uppihaldarum undir forsorg og hjá somu, lutað í ymsar inntøkubólkar, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvussu nógv fær stakur uppihaldari við 2 børnum útgoldið í forsorg pr. mðr. og árliga brutto pr. 1. januar 2015?
2. Hvussu nógv rindar sami staki uppihaldari í lands-, kommunu- og kirkjuskatti og í AMEG-gjøldum, býr viðkomandi í Tórshavnar Kommunu?
3. Hvussu stóran barnafrádrátt í lands- og kommunuskattinum fær viðkomandi persónur og hvussu stór eru barnaískoyti og barnagjøld?
4. Vísandi til spurn. 1-3, hvussu stór er nettoinntøkan hjá viðkomandi pr. mðr. og fyri árið?
5. Um sami staki uppihaldari við tveimum børnum er løntakari, hvussu nógv hevur viðkomandi eftir netto, um inntøkan er 12.500 kr./mðr. ( t.e.150.000 kr. árliga), 16.666 kr./mðr. (t.e. 200.000 kr. árliga), 20.833 kr./mðr. (t.e. 250.000 kr. árliga) og 25.000 kr./mðr. (t.e. 300.000 kr. árliga)?
6. Kann landsstýrismaðurin greina gjøldini fyri ansing og fríplass, og hvussu hesi gjøld verða skipað fyri uppihaldarar, búsitandi í Tórshavnar Kommunu?

**Viðmerkingar:**
Farnu mánaðirnar hevur nógv politiskt kjak verið um fíggjarligu støðuna hjá støkum uppihaldarum.

Tvíhildið hevur verið um, at landsins partur er ov lakur til, at stakir uppihaldarar kunnu byggja sína tilveru á haldgott grundarlag.

Flestu eru samd um, at landsstýrið og Løgtingið eiga at tryggja veikastu inntøkubólkunum so munagóðar umstøður sum gjørligt.

Í kjakinum er hópurin av tølum varpaður almenninginum um inntøkurnar hjá stakum uppihaldarum, tøl, sum ofta tykjast at vera tikin úr heildini, og tí ikki lýsa faktisku viðurskiftini, tá um brutto- og nettoinntøkur ræður. Av somu orsøk er kjakið í stóran mun farið av leið.

Fyri at fáa faktuella vitan um kringumstøðurnar viðvíkjandi forsorgarupphædd, skattum, gjøldum, ískoytum o.s.fr. verða nakrir spurningar settir landsstýrismanninum at útgreina. Spurningarnir umfata eisini støðuna hjá 4 løntakara inntøkubólkum fyri stakar uppihaldarar.

**Á Løgtingi, 8. desember 2014**

Bjarni Djurholm